gult cyan magenta svart

Rógvi aftur til Føroya

Sogndal vil síggja klaksvíkingin í venjingardysti eftir ársskifti›, á›renn stø›a ver›ur tikin til, um teir fara at bjó›a Rógva sáttmála ella ikki

Rógvi Jacobsen ver›ur ikki li›felagi vi› teir tríggjar føroyingarnar í Sogndal í hesum umfarinum. Ta› gjørdist greitt, á›renn føroyska fer›alagi› í Sogndal fór til Zürich.

Sambært heimasí›una hjá Sogndal IL fekk Rógvi Jacobsen at vita frá lei›sluni í felagnum, sum hann vitja›i í eina stóra viku, at teir høvdu gjørt av ikki at bjó›a honum sáttmála í hesum umfarinum.

– Vit hava bo›a› Rógva Jacobsen frá, at vit framvegis umhugsa at kn‡ta hann afturat okkara felagi. Men vit fara ikki at taka nakra avger› hesum vi›víkjandi, fyrrenn eina fer› eftir ársskifti›. Vit vilja hava Rógva yvir aftur higar í februar. Tá ætla vit, at hann skal spæla vi› í onkrum venjingardysti, og so fara vit at taka endaligu avger›ina, um vit skulu bjó›a honum sáttmála ella ikki, ver›ur sagt á heimasí›uni.

Framvegis óvist

Ta› er framvegis ikki greitt, um Sogndal IL komandi kappingarár framvegis fer at spæla í næstbestu deildini, ella um teir fara at flyta upp í bestu deildina. Tvey tey næstu vikuskiftini ver›a tvey tey sí›stu umførini í næstbestu deildini á skránni. Um Sogndal fær eitt stig burturúr ella meiri enn ta›, so eiga teir rættin til uppflytingarumfar ímóti tri›i lægsta felagnum í bestu deildini – tippuliguni.

Sjálvandi er keyp og søla av spælarum hjá Sogndal undan komandi kappingarári treyta› av, um li›i› fer at spæla í bestu ella næstbestu deildini.

Tríggir føroyskir landsli›sspælarar hava sáttmála vi› Sogndal. Teir eru Julian Johnsson, Hans Fró›i Hansen og Kurt Mørkøre. Teir vóru allir í landsli›sfer›alagnum í Sveis.

Rógvi Jacobsen , sum er 21 ára gamal, spældi sí›stu løtuna vi› í Sveis. Hetta var fimta fer›in, at hann slapp at royna seg í landsdysti. Allar fimm fer›irnar er Rógvi skiftur inn.

jh

Vælkomin nýggi Hvilvtenni

Tryggingarfelagið Trygd ynskir manning og reiðarí hjartaliga tillukku við nýggja skipinum og góða eydnu framyvir

TRYGD

Tórsgøta 16 Postboks 44 110 Tórshavn Tel 31 16 77 Fax 31 72 11

STATOIL Færøyene AS søkir høli til

skrivstovu

Í sambandi við oljuleiting søkja vit eftir skrivstovuhølum miðskeiðis í Tórshavn. Hølini skulu vera um 300 m².

Vit kundu hugsað okkum eitt 3-ára leigumál, ið møguliga kann verða longri. Hølini mugu vera tøk í seinasta lagi 1/1-2001.

Hølini mugu vera í góðum standi og helst hava pláss fyri parkering.

Vendið tygum til John Inderhaug á tel 34 35 00 ella skrivliga til:

STATOIL Færøyene AS
att. John Inderhaug
Viðarnes, Postboks 3098
110 Tórshavn

STATOIL

STATOIL Færøyene AS søkir

íbúð

Í sambandi við oljuleiting søkja vit eftir eini íbúð í Tórshavn til eitt av útlendsku starvsfólkum okkara.

Vit kundu hugsað okkum eitt 2-ára leigumál, ið møguliga kann verða longri. Íbúðin má vera tøk í seinasta lagi 1/1-2001.

Íbúðin má vera í góðum standi við í minsta lagi 2-3 sovikømurum.

Vendið tygum til John Inderhaug á tel 34 35 00 ella skrivliga til:

STATOIL Færøyene AS
att. John Inderhaug
Viðarnes, Postboks 3098
110 Tórshavn

STATOIL

Meti› nógv at siga

Allan Mørkøre er bæ›i errin og fegin um, at hann nú eigur landsli›smeti›, men um dystin móti Sveis helt hann, at var heldur einsamallur í sí›uni

JÁKUP MØRK

Tann føroyski leikarin, sum tóktist at hava størstu trupulleikarnar í føroyska verjupartinum leygardagin, mundi vera Allan Mørkøre.

Allan fyrra hálvleik lá hann at kalla einsamallur í okkara høgra bor›i, me›an sveisararnir høvdu tveir mans í somu sí›u, og hetta vi›førdi sjálvsagt, at hann í nógvum førum kom í tvístø›u.

Mi›jan sveik

Spurdur um hetta svara›i Allan, at hann kendi seg eisini rættiliga einsamallan har úti.

– Ætlanin var, at eg skuldi liggja aftan fyri mi›vøllin, me›an Sámal, John, Julian og Øssur skuldi vera á mi›juni. Hetta merkti so eisini, at eg skuldi taka nr. 8 hjá teimum, me›an mi›vøllurin so skuldi taka teirra vinstra bakk, tá hann kom ni›aneftir.

– Trupulleikin vi› hesum vóru tó tvinnir. ma›urin, sum eg skuldi dekka dróg í fleiri førum inn móti mi›vøllinum, og tí noyddist eg at fylgja vi›, og hetta gav rúm til bakkin. Tá so eingin á mi›vøllinum tók sær av honum, tá hann kom ni›aneftir, so mátti eg antin sleppa mínum manni, ella lata bakkin ganga leysan.

– Í seinna hálvleiki kundi ta› sum so gera ta› sama, tí tá noyddist eg eisini at draga inn í mi›verjuna, so eg kundi fylla eitt sindur upp har inni. Ta› vi›førdi so eisini, at bakkurin hjá teimum kundi gera sum honum lysti, tá hann kom ni›aneftir.

– Naka› anna› er eisini, at verjan eftir mínum tykki lá ov langt afturi á vøllinum. Høvdu vit bara komi› einar 10 metrar longur ni›an á vøllin, høvdu vit kunna gjørt ta› nógv truplari hjá sveisarunum at spæla.

Meti› nógv at siga

Dysturin móti Sveis var annars dystur nummar 52 hjá Allani í landsli›sbúnanum, og ta› er føroyskt met.

Spurdur hvussu nógvar dystir afturat, vit fáa frá hansara sí›u, er hann eitt sindur ivasamari nú, enn hann á›ur hevur veri›.

– Eg havi fyrr sagt, at tá eg ver›i 30 ár, so ste›gi eg á landsli›num. Nú ver›i eg 29 í vetur, og so er bara eitt ár eftir, um ta› skal vera galdandi.

– Eg sigi tó framvegis, at um eg ikki eri nóg gó›ur, tá eg eri 30, so ste›gi eg, men klára eg framvegis at fylgja vi› til ta tí›, so spæli eg so leingi, sum eg sjálvur haldi, at eg megni at vera vi›. Klári eg so kanska at nærkast teimum 70 dystunum, ver›ur ta› helst eitt met, sum kemur at standa í langa tí›.

Sostatt er líkt til, at hetta vi› dystartalinum veruliga er naka›, sum hevur t‡dning hjá leikarunum, og Allan váttar eisini, at so er.

– Ta› hevur øgiliga nógv at siga. At hava eitt met er altí› naka› serligt, og teir dystirnar, sum eg spæli í framtí›ini seti eg met hvørja fer›, og ta› eri eg sjálvandi fegin um.

At hava eitt met er altí› naka› serligt, seg›i Allan Mørkøre millum anna›, tá vit spurdu hann um t‡dningin av hesum

Mynd: Álvur Haraldsen

Ja, nú gjørdist ferian heldur longri enn ætla›, men har var so einki at tosa› um, seg›i Jens Kristian millum anna›

Mynd: Álvur Haraldsen

Longda vetrarfrí

Jens Kristian Hansen gleddi seg undan dystinum um, at hann nú kundi fáa naka› av hvíld, men henda gjørdist drúgvari enn ætla›

JÁKUP MØRK

Tá vit eftir venjingina hóskvøldi› tosa›u vi› føroyska li›skiparan, hev›i hann stak gó›ar vónir til dystin.

Ta› var tó eisini sjónligt, at hann samstundis gleddi seg til at fáa naka› av hvíld, nú hann í 18 mána›ir út í eitt hevur strí›st vi› fótbóltin.

Ta› var tó neyvan í hansara tonkum, at hann leygardagin skuldi fáa frí ein hálvleik ov tí›liga, men tá dómarin vísti honum ostaskorpuna, var kappingarár hansara av á hesum sinni.

Seinna hálvleik noyddist hann sostatt at síggja frá ásko›araplássinum, har hann saman vi› restini av 12. manni royndi at stu›la upp undir teir tíggju, sum eftir vóru á vøllinum.

– Ja, nú gjørdist ferian heldur longri enn ætla›, men har var so einki at tosa› um.

– Eg veit ikki akkurát, hvat eg hugsa›i í hasi stø›uni, men eg kundi so ikki funni› upp á at gjørt naka› so b‡tt vi› beráddum huga.

Óvist vi› várinum

– Hvussu ver›ur næstu fer›, kann eg so ikki sjálvur svara fyri, tí tá havi eg so undir øllum umstø›um leikbann, men eg rokni tó vi›, at avriki› ver›ur betri.

– Dysturin í dag var ein ordiligur off-day hjá okkum, men vónandi ver›ur ta› so ikki galdandi til ta tí›.

– Hvussu ver›ur vi› landsdystum fyri mítt vi›komandi komandi vár, dugi eg heldur ikki at siga. Ta› er naka› sum Allan Simonsen má taka stø›u til. Fyrsta fer›in er jú til Luksemburg og Russland, so eg kann væl spæla seinna dystin av hesum, men ta› er so upp til venjaran, um hann tekur meg vi› í hópin. Eisini má hann gera av, hvørt eg skal vi› á venjingarleguna, sum helst ver›ur í februar mána›i, men alt ta› er so naka›, sum vit mugu finna út av til ta tí›.

Ta› kendist heilt náttúrligt

Uni Arge helt eftir dystin, at hann mundi vera ein gó›ur li›skipari, tí einki mál kom me›an hann hev›i hendan leiklutin

JÁKUP MØRK

Ofta ver›ur tiki› til, at áleyparar kanska eru í so málgræ›ir, tá teir eru inni í brotsteiginum.

Uni Arge er helst einki undantak í so máta, men leygardagin var hann í einum n‡ggjum leikluti, tá hann átti næstseinasta fótin á bóltinum, tá John Petersen leg›i Føroyar á odda. Vit spurdu Una eftir dystin, hvørt hetta nú eisini var tilætla›.

– Nei, ta› var ta› helst ikki. Ta› var solei›is, at vit royndu fyrst einar tvær fer›ir at skjóta á máli›, og onkursvegna datt bólturin aftur til mín. Eg royndi so at smekka til, og ta› var so heppi› at hann fekk kós beint móti John, so mál spurdist burtur úr hóast alt.

Seinni átti Uni eisini ein gó›an møguleika, tá hann og Julian spældu seg ígjøgnum, men ta fer›ina, var› skoti› beint vi› sí›una av málinum. Sjálvur helt Uni annars um hetta, at hann misti bóltin av langt frá sær í temjingini, solei›is at hann ikki fekk rættiligt skot á.

N‡ggjur li›forma›ur

Tá John Petersen í seinna hálvleiki fór av vøllinum, slapp Uni Arge fyri fyrstu fer› at bera li›formansbindi› á li›num, og eftir dystin tóktist hann ikki at hava naka› ímóti hesum.

– Eg má bara siga, at ta› kendist heilt náttúrligt at smoyggja bindi› upp á armin, seg›i hann flennandi, tá vit spurdu hann um hetta, og so leg›i hann afturat.

– Eg vil siga ta›, at eg stó› meg fyrimyndarliga væl sum li›forma›ur. Me›an eg var li›forma›ur, fór einki mál ígjøgnum hjá okkum, so eg haldi bara, at eg eisini bjó›i meg fram næstu fer›.

Eg royndi so at smekka til, og ta› var so heppi› at hann fekk kós beint móti John

Mynd: Álvur Haraldsen